**KRABBAMEINSFELAGIÐ**

Grønlandsvegur 58
Postboks 1216
FO-110 Tórshavn

Telefon: 31 79 59
www.krabbamein.fo
T-post: kmf@krabbamein.fo

krabbameinsfelagið

# Samrøðubólkur

## Fyri makar hjá krabbameinssjúklingum



Krabbameinsfelagið
*Umsorgan fyri tær*

1. februar 2019



## Samtalubólkur við ráðgevum frá Krabbameinsfelagnum

At skipa fyri og leiða bólkin eru sjúkrarøktarrøðingar hjá Krabbameinsfelagnum, sum hava terapeutiska eftirútbúgving og drúgvar royndir at arbeiða við fólki, sum er í sorg og kreppu.

## FRÁ LUTTAKARA:

Gott at tað er hjálp at fáa, tá ið orka og evni ikki røkka. Eitt stað har tey,  ið luttaka, eisini stríðast við stórar trupulleikar og sorgir. Tað ber til at tosa saman hóast ymiskleika í aldri og kyni, og um fólk eru stødd ymsastaðni í sjúkugongdini sum avvarðandi hjá krabbameinssjúklingi.

Tíðin í bólkinum gav mær mentalu høkjuna at klára tungu tíðina, sum var, og har var rúm fyri mær.



## Í somu støðu

Tá ið krabbamein rakar, broytist gerandisdagurin, og tey avvarðandi skulu taka støðu til nógv nýggj viðurskifti, bæði praktiskt og kensluliga. Mitt í sorgini og stúranini skal makin hjá tí sjúka bæði hjálpa, ugga og fáa gerandisdagin at virka sum best fyri allar partar.

Tað hevur stóran týdning at fáa stuðul í einari slíkari støðu.

Krabbameinsfelagið skipar tí fyri einum bólki, har makar hjá krabbameinssjúklingum kunnu møtast. At hitta fólk í somu støðu í einum umhvørvi, har tað er í lagi at seta orð á sínar hugsanir og fáa stuðul at loysa ymsar trupulleikar í trúnaði, er við til at geva orku og styrkja tann avvarðandi til at megna sínar uppgávur. Tað verða sjúkrarøktarfrøðingar hjá Krabbameinsfelagnum, ið skipa fyri løtuni.

## Um bólkin

Bólkurin hittist vanliga 14. hvønn dag frá kl. 13.00 til 15.30, 6 - 8 ferðir í alt.

Bólkurin hittist í hølunum hjá Krabbameinsfelagnum á Grønlandsvegi 58 í Havn.

**Tað er ókeypis at luttaka.**

Hevur tú hug at luttaka í einum samrøðubólki, ella hevur tú spurningar viðvíkjandi tilboðunum hjá Krabbameinsfelagnum, kanst tú seta teg í samband við okkum við at ringja 317959 ella senda teldubræv til kmf@krabbamein.fo